# Quiz

**1** Løgtingsmaður hjá Fólkaflokkinum fór í vikuni úr flokkinum. *Hvør var løgtingsmaðurin?*

**2** Løgtingsins Umboðsmaður er afturvaldur til eitt nýtt skeið. *Hvussu eitur hon?*

**3** Danskur tennisspælari er nú ovast á styrkislistanum yvir heimsins kvinnuligu tennisspælarar. *Hvussu eitur hon?*

**4** Stjórin á Føroya Handilsskúla í Havn finnist harðliga at leiðslu og nevnd í Eik. *Hvussu eitur handilsskúlastjórin??*

**5** Føroyingar fingu mál í fótbóltslandsdystinum ímóti Slovenia farna vikuskiftið. *Hvør skoraði málið?*

**6** *Hvussu eitur danski ráðharrin, sum varðar av málinum um Eik Banka?*

**7** *Hvussu nógvir tinglimir eru partir av ABC-samgonguni, nú ein fólkafloksmaður er farin burturav?*

**8** *Hvussu eitur stjórin á TAKS?*

**9** *Hvør er í løtuni toppskjútti í Vodafonedeildini í fótbólti?*

**10** Brúkaraumboðsmaðurin ætlar sær at halda eyguni við marknaðarføring á eitt nú Facebook. *Hvussu eitur Brúkaraumboðið?*

**1-4** Ikki nóg gott
**5-7** Tú fylgir hampuliga væl við
**8-9** Tú fært tað mesta við
**10** Veitst tú alt?

**SVAR**

*1. Poul Michelsen, 2. Sólja í Ólavsstovu, 3. Caroline Wozniacki, 4. Reidar Nónfjall, 5. Christian Restorff Mouritsen, 6. Brian Mikkelsen, 7. 19 tinglimir, 8. Eyðun Mørkøre, 9. Arnbjørn T. Hansen , 10. Andras Holm Arge*

## 10 TING UM Sir Cliff Richard

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale



# Tak á kvinnum

Í VIKUNI GJØRDIST HANN **70 ÁRA** GAMAL, MEN **CLIFF RICHARD** HEVUR **FRAMVEGIS** GOTT TAK Á **KVINNULIGU** FJEPPARUNUM, M.A. **MARGRETHU DROTNING**, SUM YNSKTI SÆR **HANN** SUM **FØÐINGARDAGSUNDIRHALD** FYRR Í ÁR. HANN HEVUR HAVT SERA STÓRA ÁVIRKAN Á BRETSKAN **ROCK N' ROLL** TÓNLEIK, OG ER **SAGDUR** AT VERA OV **VAKUR** TIL SJÓNVARPIÐ.

**1** Rætta navnið er Harry Roger Webb, og hann varð føddur 14. oktober 1940 í bretska partinum av India.

**2** Tá India gjørdist sjálvstøðugt í 1947, flutti familjan aftur til Bretlands. Nógvar leysasøgur siga, at Cliff Richard er hálvur indari. Sjálvur hevur hann tó hvørki sannað ella avsannað hendan slaturin.

**3** Hósdagin gjørdist sir Cliff Richard 70 ár, men hann er framvegis virkin tónleikari.

**4** Saman við bólkinum The Shadows merkti hann bretska tónleikin í 50'unum og 60'unum.

**5** Sagt verður, at hann slættaði vegin fyri The Beatles, tí saman við The Shadows setti hann Rock n' Roll á breddan. Tað var orsøkin til, at plátufelagið Parlaphone fór at leita eftir einum nýggjum Cliff Richard og The Shadows. Teir funnu the Beatles.

**6** Í 1964 traðkaði Cliff Richard fram sum nýfrelstur trúgvandi, og við hesum skifti hann stíl og segði rock n' roll lívsstílinum farvæl.

**7** Í 70'unum var hann við í nógvum sjónvarpssendingum og var tá betri kendur fyri sjónvarp enn tónleik.

**8** 25. oktober 1995 varð Cliff Richard fyrsti tónleikarin, sum varð sligin til riddara. Eftir hann komu Paul McCartney og Elton John.

**9** Seinastu seks áratíggjuni hevur Cliff Richard havt hópatals stakfløgur á hittlistunum, og hann hevur selt fleiri stakfløgur enn bæði the Beatles og Elvis.

**10** 10: Hann hevur altíð rúnarbundið kvinnuligu áhoyrarnar, og hennara hátign Margreta drotning yngdist eisini upp, tá Cliff Richard sang »congratulations« fyri henni á 70 ára degi hennara í apríl í ár.

## SITAT



Tú veitst, at tað er kærleiki, tá ið tú ynskir, at ein persónur er lukkuligur, hóast tú ikki sjálv ert partur av lukkuni.

***Julia Roberts, sjónleikari***